# Slættanes fekk ongantíð sítt heimskort



HEIMSKORT

*Hetta er heimskortið, sum ongantíð kom longur enn til Vestmannar, men sum framvegis er til í Vestmanna í dag Mynd: Birgir W. Høgnesen*

**Tá Frímann Símunarson á Brúnni, ið seinni gjørdist kendur sum prestur, var vikarur á Slættanesi, bílegði hann í 1962 eitt heimskort til skúlan. Men heimskortið kom ongantíð til bygdina, tí tá kortið umsíðir kom heim til Føroya eini tvey ár seinni, var skúlin í bygdini niðurlagdur, og seinastu fólkini fluttu av Slættanesi**

Vilmund Jacobsen

Søgan um, tá skúlin á Slættanesi varð niðurlagdur, og seinasta húskið flutti av bygdini, er samstundis søgan um eitt heimskort, sum í dag hongur uppi í Vestmanna.

Frímann Símunarson á Brúnni var vikarur á Slættanesi, tá hann í 1962 bílegði eitt heimskort til skúlan í bygdini. Kortið varð bílagt úr útlandinum, og tað tók sína rúmu tíð at fáa tað heim til Føroya. Tá kortið endiliga kom higar til lands – eini tvey ár seinni – var skúlin í bygdini niðurlagdur, og seinasta húskið flutti av Slættanesi.

Heimskortið skuldi koma heim til Føroya við Skipafelagnum, og tað var umboðið hjá felagnum í Vestmanna, Niels Winther Olsen, sum skuldi syrgja fyri, at kortið eisini kom út til Slættanesar.

Men hetta varð av ongum, og kortið var tískil verandi í avgreiðsluni hjá Skipafelagnum í Vestmanna.

Og í Vestmanna er heimskortið enn tann dag í dag.

### Hvar er kortið?

Trý ættarlið í Vestmanna vóru tíðarskeiðnum frá 1919 til ár 2000 umboð fyri Skipafelag Føroya og høvdu soleiðis avgreiðsluna hjá felagnum um hendi.

Fyrstur var John Olsen, sum røkti hesa uppgávu árini 1919-1950. Síðan tók sonur hansara, Niels Winther Olsen, við og umboðaði felagið árini 1950-1987, tá Heðin Winther Olsen í triðja ættarliði tók við avgreiðsluni.

Heðin, sum er sonur Niels W. Olsen, sigur, at hann var avgreiðslumaður fram til ár 2000, tá avgreiðslan hjá Skipafelag Føroya í Vestmanna varð niðurløgd.

Áður umrødda heimskort, sum varð bílagt til Slættanesar, endaði á avgreiðsluni hjá Skipafelag Føroya í Vestmanna, og tá Heðin W. Olsen fór av skrivstovuni, helt hann tað vera synd at koyra kortið burtur.

Hann tók heimskortið við sær, og í síðstu viku avmyndaði Sosialurin kortið við hesi serstøku søgu heima hjá Heðini W. Olsen.

Heimskortið er 2x1,25 metrar til støddar.

### Skúli og kirkja

Um vit nú líka venda aftur til Frímann, sum seinni gjørdist kendur prestur í Føroyum, so fekk hann urgu út til Slættanesar, so betri umstøður vóru til sang, tá lestur varð lisin í bygdini.

Meðan Frímann Símunarson á Brúnni var vikarur á Slættanesi, setti hann sær fyri, at skúlin í bygdini eisini skuldi gerast kirkja. Hann skipaði fyri, at skúlaparturin vendi ein veg – og kirkjuparturin ein annan, og hann fekk bæði altar og knæfall gjørt.

*vilmund@sosialurin.fo*

# 130 fólk búðu á Slættanesi



SLÆTTANES

***Síðan seinastu fólkini fluttu av Slættanesi, hevur bygdin verið frítíðarstaður hjá fólki, ið eru ættað úr bygdini ella fólki, sum hava havt tilknýti til bygdina***

***Mynd: Jóanis Nielsen***

**Tá fólkatalið á Slættanesi var størst árini 1945-1950, búðu ikki færri enn 130 fólk í 12 húsum. Sløk 15 ár seinni fluttu seinastu fólkini úr bygdini**

Vilmund Jacobsen

Slættanes var niðursetubygd. Tey fyrstu fólkini búsettust har í 1835. Tann fyrsti niðursetumaðurin kallaðist Heindrikkur Thomasen.

Tá bygdin var størst í umleið 1945-1950 búðu 130 fólk á Slættanesi. Húsini vóru 12 í tali. Fólki livdi av útróðri og landbúnaði, eitt nú neytahaldi, seyðahaldi og eplavelting.

Sambært keldum varð postskiftisstøð skipað á Slættanesi seinast í 1930-unum – ella í umleið 1940. Fyri ta tíð tóku slættanesmenn, sum fóru til Vestmannar í eitt nú handilsørindum, farandi post við sær og heintaðu samstundis komnan post til fólkið á Slættanesi á posthúsinum í Vestmanna.

Postbáturin Ólavur fór á sumri í 1948 at sigla millum Vestmanna og Slættanes. Báturin sigldi tveir dagar um vikuna, mikudag og leygardag.

Slættanes er brimpláss, og um veturin varð ofta bíðað eftir tí rætta sjóvarfallinum. Viðraði ikki tann dagin, tá postbáturin skuldi koma, kom hann í staðin, tá tað viðraði.

Tey fyrstu fimm árini kom posturin beinleiðis frá posthúsinum í Havn umborð á postbátin í Vestmanna, men eftir hetta varð postskiftisstøðin á Slættanesi løgd undir posthúsið í Vestmanna.

Henda skipan hevur helst verið galdandi, til postskiftisstøðin á Slættanesi varð latin aftur í 1964.

Tey seinastu fólkini fluttu av Slættanesi í 1965. Síðan tá hevur bygdin verið frítíðarstaður hjá fólki, ið eru ættað av Slættanesi ella fólki, sum hava havt tilknýti til bygdina.

Kelda til hesar reglur um Slættanes er Vilhelm Johannesen, sum hevur skrivað um postsøguna hjá Slættanesi fyri táverandi Postverk Føroya.

*vilmund@sosialurin.fo*